**Millum**

**Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya**

**er henda semja gjørd**

**§ 1**

Lønin hækkar:

| | |
|---|---|
| • 1. oktober 2007 | 2,20 % |
| • 1. oktober 2008 | 2,30 % |
| • 1. oktober 2009 | 2,20 % |

**§ 2**

Eftirlønin hækkar:

| | |
|---|---|
| • 1. oktober 2006 | 12,15 % |
| • 1. oktober 2007 | 13,15 % |
| • 1. oktober 2008 | 14,00 % |
| • 1. oktober 2009 | 15,00 % |

**§ 3**

Í sáttmálanum verða hesar broytingar gjørdar:

§ 1, *Stk. 5* verður orðað soleiðis:
Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrættin.

§ 3, *stk. 11* verður orðað soleiðis:
Virkandi formaður í felagnum hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur stovnurin skyldu at hava starv til viðkomandi, tá ið formanstíðin er úti.

Nýtt *stk. 3* í § 4 verður orðað soleiðis:
*Stk. 3.* Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í Starvsmannafelagnum.
Verandi *Stk. 3* verður til *Stk. 4.*

§ 18 verður orðað soleiðis:
Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Arbeiðstíðin á hvørjum einstøkum stovni verður at leggja í samráð millum leiðslu og starvsfólk, tó soleiðis, at leygardagur verður frídagur, har hetta letur seg gera.

§ 20 verður orðað soleiðis:
Partarnir eru samdir um, at sløkkiliðsfólk fáa vaktargjald, sum er 10% av mánaðarlønini eftir lønarflokki 3, 1 stig (stig 7).
*Stk. 2.* Fyri at kava verður latin ein eyka samsýning uppá kr. 80,00 um tíman.
*Stk. 3.* Sløkkiliðsfólk fáa skattafrítt telefongjald á kr. 115,- um mánaðin fyri at hava telefon heima, um hetta er eitt krav.

***Notat viðv. § 20:***
*(í semjuna, sum kunning um hvat semjan merkir)*
*Semjan viðvíkjandi sløkkiliðsfólki merkir, at yvirarbeiði verður lønt sambært § 26 í sáttmálanum og yvirtíðin avgreidd eftir § 31.*
*Útkalling og venjing, ið áður vóru fevnd av serligum gjaldi, eru nú at rokna sum yvirtíð, tá hesi fella uttanfyri vanligu arbeiðstíðina.*

§ 40 verður orðað soleiðis:
Er partur av útbúgvingini skipaður sum praktikk, sum hjá t.d. tíðindafólki og akademiøkonomi, fær praktikanturin 80 % av byrjanarlønini hjá útlærdum. Praktikktíðarskeiðið hjá sosilaráðgevalesandi er, sambært galdandi lestrarreglum, ólønt.
*Stk.2.* Starvsfólk, ið hevur ábyrgdina av praktikktíðini hjá einum lesandi, fær eina praktikkvegleiðara-viðbót.
Hevur viðkomandi starvsfólk nomið sær praktikkvegleiðaraútbúgving er viðbótin kr. 1.200,00 um mánaðin og fyri tann, ið ikki hevur nomið sær hesa, er viðbótin kr. 900,00 um mánaðin, meðan viðkomandi hevur praktikant

§ 42 verður orðað soleiðis:
*Stk. 1.* Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2006. Báðir partar kunnu siga sáttmálan upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2010.
Í sambandi við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingarnar byrja um at endurnýggja sáttmálan 6 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.
*Stk. 2.* Partarnir eru samdir um 1. oktober 2008 at umrøða § 36 í sáttmálanum, um munandi broytingar, ið hava ávirkan á lønarlagið, eru farnar fram í samfelagnum.
Henda áseting kann ikki føra til, at sáttmálin verður uppsagdur í sáttmálaskeiðnum.

Í **“Fylgiskjali um flokkan og lønir”** verða hesar broytingar gjørdar:

**4. Starvsinnihald**
Serliga útsett størv kunnu verða flokkað í V. lønarflokki óheft av útbúgvingarkrøvum.

**Vaktargjøld**
Vaktargjald 1 verður 18% av tímalønini í 3.1
Vaktargjald 2 verður 36% av tímalønini í 3.1
Vaktargjaldið sbr. § 20 hækkar til 11%

Hesar umflokkingar verða gjørdar:
- Læknaskrivarar flyta upp í 4. flokk
- Leiðsluskrivarar flyta upp í 5. flokk
- Serfrøðingar I flyta upp í 7. flokk
- Serfrøðingar II flyta upp í 8. flokk
- Deildarleiðarar 3 skulu ganga tey 7 stigini frá 30 til 36
- Tannklinikkassistentar flyta upp í 3. flokk

Í **7. EDV-leiðarastørv** verða reiðuviðbøturnar broyttar soleiðis:
EDV-leiðari I 3.000,-
EDV-leiðari II 3.300,-

Tórshavn, hin 28. februar 2007

| **Starvsmannafelagið** | **Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya** |
|---|---|
| Gunnleivur Dalsgarð / Anna Johannesen | Heðin Mortensen / Anita Fuglø |
| Selma Ellingsgaard | Karl A. Olsen |
| Niels á Reynatúgvu | |
| Eimi Fossdalsá | |
| John Kjær | |